# Føroysk flokssett til grunddeild

**Juni 2024**




NÁM

Andreassen, Sólgerð
**Knassi og Rokkarin (2008)**
Søga fyri børn. Heimalambið Knassi verður sett í fjósið saman við tí garvilla frísuta Rokkaranum. Hetta gongur ikki væl, men tá ringast stendur til hjá Knassa, kemur ein vættur at ugga hann og at siga frá søgum.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 70




Bergrún Íris Sævarsdóttir
**Nógv tann elsti í flokkinum (2022)**
Tað kann vera eitt sindur merkiligt at byrja í nýggjum skúla, tá tú ongan kennir. Tað er eisini løgið, tá ein 96 ára gamal maður setir seg undir liðina á tær, og eingin annar hugsar um tað! Skjótt verða floksfelagarnir Eyð og Ragnar bestu vinir, hóast tað eru 90 ár á muni millum tey. Tá Eyð uppdagar loyndarmálið hjá Ragnari, gera tey bæði eina avtalu, men fer Eyð at klára at halda hana?
Floksstig: 1. – 4.
Síðutal: 78




Bross, Helena
**Sterkastur í flokkinum (2009)**
Edvin skal byrja í fyrsta flokki, og hann gleðir seg sjálvandi, men mamman og pápin hava gloymt at keypa honum skúlatasku. Tí fær hann gamla ryggsekkin hjá pápanum at brúka sum skúlatasku. Men øll vita, hvussu týdningarmikið tað er at hava røttu taskuna.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 56




Christensen, Ingun
**Eiturkoppaprinsessen (2013)**
Kongur og drotning ynskja sær so inniliga eitt barn, og tá tað endiliga eydnast, fáa tey eina vakra dóttur. Men ein hevndarhugað gomul kona spillir alla eydnuna fyri kongshjúnini og gandar prinsessuna um til ein eiturkopp! Sum altíð í ævintýrum, so endar alt í gleði og gleimi. Men fyrst skulu tey so grúiliga nógv ígjøgnum!
Floksstig: 2. – 4.
Síðutal: 82




Henmo, Sverre
**Renn! (2013)**
Øssur og Maria eru grannar. Ein dagin hvørvir hundurin hjá Mariu, og lítlibeiggi Øssur verður tikin "til fanga". Sjálvt um Øssur ræðist hundar, noyðist hann at hjálpa til at leita.
Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 112



Hole, Stian
**Gøtan hjá Gudmundi (2012)**
Myndabók. Summarið er farið, men enn er Gudmundur bangin. Pápin hevur sagt, at bara hann, sum er øgiliga bangin, kann vera djarvur. Men hvør fær verið djarvur, tá ið Rói úr fjórða stendur fyri einum í portrinum? Rói lokkar Gudmund at seta eld á turra grasið í urtagarðinum hjá Frímerkjamanninum. Men saman við Frímerkjamanninum verður Gudmundur so líðandi tryggari.
Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 44




---

Hole, Stian
**Loyndarmálið hjá Gudmundi (2013)**
Myndabók. Gudmund hittir tvíburagentuna Jóhannu. Jóhanna vísir Gudmundi á eitt loyndarmál í skóginum. Tað verður loyniliga staðið hjá teimum báðum í skóginum og saman vitja tey staðið nærum hvønn dag og lata hugin reika.
Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 52




---

Hole, Stian
**Summarið hjá Gudmundi (2011)**
Myndabók. Seks ára gamli Gudmundur stendur við eitt vegamót. Hann skal í skúla, og hann stúrir eitt sindur fyri tí. Gomlu ommurnar eru og vitja, og heyst er í luftini. Hetta er ein søga um nakað, sum skjótt er liðugt, og nakað sum fer at byrja.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 44




---

Hoydal, Dánial
**Abbi og eg og abbi (2023)**
Abbi og eg eru væl. Vit geva dunnunum saman, og hann lesur søgur fyri mær, og so dugir hann so væl at roksa og flenna eftir tí aftaná. Men so broytist abbin, hann roksar og flennir ikki aftaná.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 31




---

Johansen, Oddvør
**Vinni vespa (2009)**
Myndabók. Niðri millum blómurnar í urtapottinum situr ein heilt vanlig vespa við gulum strípum. Lítla vespan hevur sovið allan veturin, men tá várið kemur, vaknar hon og fer til verka. Men í býnum eru øll ikki líka glað fyri henda nýggja gest, ið komin er. Bókin lýsir á stuttligan hátt, hvussu vit ræðast vespurnar sum pestina.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 28



King-Smith, Dick
**Hennara Hátign Sleikisneis (2004)**
Søga um prinsessuna Petronellu, sum ynskir sær ein grís. Og hann fær hon tí at øll vita, at hon verður í øðini, um hon ikki fær sín vilja. Men grísurin er ikki ein vanligur grísur...
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 120




---

Kirkegaard, Ole Lund
**Lítli Virgar hjálpir einum eina-og-aleina storki (2018)**
Myndabók. Ein eina-og-aleina storkur býr á skorsteininum hjá keypmanninum. Keypmaðurin óttast fyri, at skorsteinurin skal detta niður, og hann lovar lítla Virgari og vinum hansara tríggjar lakrespípur, um teir kunnu finna ein maka til eina-og-aleina storkin.
Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 36




---

Kirkegaard, Ole Lund
**Lítli Virgar og drekin (2018)**
Myndabók. Lítli Virgar, Oskar og Karl Emil fara at leita eftir einum dreka, sum Oskar sigur seg hava sæð niðri við vatnmylluna. Tað er eitt farligt ódjór við fýra høvdum og sjey beinum, sum bara etur prinsessur og eld..., um tað nú er til í veruleikanum.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 28




---

Kunnas, Mauri
**Víkingarnir koma (2007)**
Myndabók. Hetta er ein bók, har søgur úr víkingatíð verða sagdar á ein heilt øðrvísi hátt. Í bókini eru púra garvillar søgur um hendingar, sum víkingar eru fyri á ferðum runt um í heiminum, men tær eru allar grundaðar á veruligar søguligar hendingar. Átta nýmótans víkingasøgur. Vit hitta m.a. Gunnar Geitafjørð, Búa Berserk, ungu víkingagentuna Køtlu og eina reyða kúgv.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 51




---

Lambavík, Sunneva
**Gullleyvan (2022)**
Myndabók. Søga um Sáru og abban, og um Norsku løvu, ið rendi á land í Lamba í 1707.
Í bókini er qr-koda. Skanna qr-koduna við fartelefon ella teldli og hoyr søguna sum ljóðmynd.
Floksstig: 1. – 4.
Síðutal: 36




---

Lidbeck, Petter
**Gandakeppurin (2009)**
Søga fyri børn. Tá ið Mustafa, býttlingurin í flokkinum, fær fatur á einum gandakeppi, vendist lív hansara fullkomiliga á høvdið. Knappliga dugir hann at svara øllum spurningum, og eftir einum degi verður hann kendur í sjónvarpi. Men framgongdin hevur sín prís.
Floksstig 2. – 4.
Síðutal: 115




Lindgren, Astrid
**Emil og Ida í Lønnibergi (2009)**
Í bókini eru tríggjar myndabøkur um Emil og Idu og teirra skálkabrøgd. Í Kattholti í Lønnibergi er hugnaligt, tað halda øll. Eisini á verkstaðnum er hugnaligt; har situr Emil mangan og hugsar um síni skálkabrøgd. Ida lítla vil hava Emil at læra seg at gera skálkabrøgd. Men tað ber ikki til, sigur Emil, tí skálkabrøgd tey koma bara!
Floksstig 1. – 4.
Síðutal: 120




Lindgren, Astrid
**Kennir tú Pippi Langsokk (1997)**
Myndabók um heimsins sterkastu gentu, Pippi, sum dugir so væl at hava tað stuttligt, og ikki leggur petti í, hvat hini halda. Nú er Pippi Langsokkur flutt inn í Villingavál við hestinum og apuni, sum eitur Nilli, Hon eigur onga mammu ella pápa, sum siga henni, hvat hon skal gera. Pippi ger altíð júst, sum hon sjálv vil!
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 28




Lindgren, Astrid
**Søgur úr Dundurdali (2007)**
Søgur fyri børn. Í Dundurdali búgva sjey børn. Tey spæla næstan altíð, og ikki gongur tað altíð so friðarliga fyri seg. Helst má okkurt henda alla tíðina, og tað ger tað! Tær tríggjar søgurnar í bókini eru:

- Barnafagnaður í Dundurdali
- Vár í Dundurdali
- Jól í Dundurdali

Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 80




Madonna
**Ensku rósurnar (2003)**
Myndabók. Fýra vinkonur eru øvundsjúkar inn á Binu og vilja ikki vera saman við henni. Men ein álva vísir teimum, at Bina er bæði einsamøll og móðurleys.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 46



Simon, Francesca
**Herviligi Henry (2007)**
Søga fyr børn um Herviliga Henry, sum øll elska at hata.
Fýra søgur:

- Frálíki dagurin hjá Herviliga Henry
- Heviligi Henry dansar
- Herviligi Henry og Droya Drós
- Herviligi Henry er og ferðast

Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 96




---

Simon, Francesca
**Herviligi Henry heldur jól (2013)**
Søga fyri børn um herviliga Henry, sum øll elska at hata.
Fýra søgur:

- Jólaframførslan hjá Herviliga Henry
- Jólagávurnar hjá Herviliga Henry
- Herviligi Henry setir fellu fyri jólamannin
- Jóladøgurðin hjá Herviliga Henry

Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 106




---

Simon, Francesca
**Herviligi Henry og trølladiddan (2009)**
Søga um Herviliga Henry, sum øll elska at hata.
Fýra søgur:

- Herviligi Henry gongur grýla
- Herviligi Henry og trølladaddan
- Herviligi Henry herjar á
- Biltúrurin hjá Herviliga Henry

Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 96




---

Simon, Francesca
**Herviligi Henry rænir bankan (2013)**
Søga um Herviliga Henry, sum øll elska at hata.
Fýra søgur:

- Herviligi Henry gevur blað út
- Skúlin hjá Droyu Drós
- Sjórænaraveitslan hjá Frálíka Fríðriki
- Herviligi Henry rænir bankan

Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 109




---

Oskarsson,Bárður
**Stríðið um tað góða grasið (2012)**
Myndabók. Kaninirnar renna, hoppa og spæla sær í tí besta, bleytasta og grønasta grasinum í landinum. Tað er bara tað, at tær ikki fáa frið fyri hundunum, sum jagstra kaninirnar, tí hundar jagstra alt, og so pissa og kukka teir eisini í tað góða grasið.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 33




---

Rógvi, Elin á

**Og mamma! (2014)**

Søga fyri børn. Um ein hana og ein abba. Hanin er ein øgiliga spesiellur hani, hann gongur í smekkubuksum og dugir at tosa, og so er hann eitt lítið sindur frekur eisini.

Ein rúgva av misskiljingum, ein rúgva av hugflogi og ein sera skemtilig søga.

Floksstig: 1. – 3.

Síðutal: 44




---

Said, Sami

**Eta gras (2020)**

Myndabók. Imani Lillian Mau dámar alt, at klintra ovast upp í trø, at telja til hundrað og eitt og at fara eftir vatni hinumegin fjallið. Onki kann steðga henni.

Floksstig 1. – 3.

Síðutal: 24




---

Widmark, Martin

**Blaðgátan (2009)**

Krimisøga. Válavíkarblaðið er farið at skriva undarligar greinar um íbúgvarnar í Válavík, sum Lassi og Maia ikki fáa seg at trúgva, men maðurin í kioskini er glaður, tí blaðið selur sum ísur um summarið. Lassi og Maia gera av at fara undir at loysa gáturnar, tí hetta kann ikki vera rætt, og haraftrat er so sum so við stavingini í blaðnum, so her ruggar alt ikki rætt.

Floksstig 1. – 3.

Síðutal: 93




---

Widmark, Martin

**Gimsteinagátan (2006)**

Krimisøga. Onkur hevur stolið gimsteinar frá gullsmiðinum Muhammed Karat. Alt bendir á, at talan er um eitt av starvsfólkunum – Siv Flennander, Tóra Díki ella Líggjas Klikk. Løgreglan stendur á berum, so nú mugu ungu detektivarnir Lassi og Maia taka sær av málinum.

Floksstig 1. – 3.

Síðutal: 72




---

Widmark, Martin

**Gistingarhúsgátan (2006)**

Krimisøga. Sjálvan jólaaftan fer hin fína familjan Åkerø á gistingarhús og við sær hava tey ein sera virðismiklan kinesiskan súreplamops. Starvsfólkið fyrireikar eina stóra jólaveitslu, men skjótt byrja trupulleikarnir. Til alla lukku eru detektivarnir Lassi og Maia har fyri at loysa málið.

Floksstig 1. – 3.

Síðutal: 72



Widmark, Martin
**Skúlagátan (2009)**
Krimisøga. Í Válavík floymir tað yvir við følskum pengaseðlum. Sporini føra Lassa og Maiu til teirra egna skúla. Men fyri at avdúka tann seka mugu tey sita á varðhaldi um náttina og duga væl við amboðunum, tá ið fingramerki skulu savnast inn.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 88




Aakeson, Kim Fupz
**Vitello hittir Gud (2017)**
Myndabók. Hetta er ein av teimum døgunum, har tað ikki er so stuttligt at vera Vitello og ongan pápa at eiga. Men so hittir hann ein gamlan mann við stórum hvítum skeggi. Hann situr við einari øl á einum beinki við sentrið. Vitello kennir bara tveir gamlar við so stórum hvítum skeggi, Gud og jólamannin. Og tað er ikki jól. Og Gud kann, sum øll vita, fáa alt møguligt at henda, alt í allari verðini...
Floksstig: 1. – 3.
Síðutal: 26




Aakeson, Kim Fupz
**Vitello vil hava ein pápa (2013)**
Myndabók. Vitello býr saman við mammu, bara saman við mammu. Pápin er ikki serliga nógv hjá teimum. Faktiskt er hann ongantíð har, og tað er irriterandi, heldur Vitello, tí allir hinir dreingirnir hava pápar. Men Vitello ger av at billa vinunum inn, at hann eisini hevur ein pápa.
Floksstig 1. – 3.
Síðutal: 28

